# Fríðka kirkjugarðin á Sandi

Á bygdarráðsfundi á Sandi mánakvøldið var eitt av málunum, ein áheitan frá Eyðuni Viderø um at fríðka um kirkjugarðin á Sandi. Ein onnur áheitan frá einum øðrum heimasandsmanni, Sólvit Simonsen var eisini til viðgerðar. Vinnu- og tøkninevndin mælir til, at ein reglugerð verður gjørd fyri kirkjugarðin á Sandi í samráð við kirkjuráðið fyri Sands kirkju (myndin). Bygdarráðið samtykti einmælt tilmælinum frá vinnu- og tøkninevndini.



# Endurskoða skúlan í Fuglafirði

Í mei mánaði gjørdi Mentamálanevndin í Fuglafjarðar kommunu av at seta ein bólk, ið skuldi endurskoða skúlaskapin í kommununi. Bólkurin, ið kallast "Arbeiðsbólkur viðvíkjandi framtíðar skúlaskapi í Fuglafjarðar kommunu," hevur nú havt innleiðandi fundin, har bólkurin varð skipaður og arbeiðssetningurin greiddur. Eyðun á Lakjuni er formaður í bólkinum, sum annars er mannaður við politikarum og umboðum úr dagrøktini, fólka- og frítíðarskúlanum, skúlastýrinum og kommunalu fyrisitingini.

# »Logos Hope« sum eitt annað skip




*Logos Hope varð móttikið við Merkinum á odda, tá lagt varð til bryggju sunnukvøldið*

*Mynd: kristnastova.dk*

**Sunnudagin legði "Logos Hope" til bryggju í danska býnum Køge. Hetta hendir eftir at skipið, sum er gamla Norröna hevur fingið stórar umvælingar á skipasmiðjum í Kroatia og Týsklandi.**

TRÚBOÐAN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Køge:** Frá at hava verið eitt ferðamannaskip, er Logos Hope í dag umbroytt til eitt nýtt missiónsskip.

Tey, ið áður hava ferðast uttanlands við táverandi Norrönu, munnu neyvan kenna skipað aftur innanborða.

Millum stóru broytingarnar kann nevnast, at eitt dekk er gjørt aftrat á gamla bildekkinum, eins og ein stór høll er gjørd afturi í skipinum til framførslur og annað.

Har er so at siga alt broytt, soleiðis at bæði støddin og innrættingin av tí júst kann geva felagsskapinum og manningini møguleikarnar at inna sína tænastu: At geva vitan, hjálp og vón til fólk kring allan heimin.

Ætlanin er at skipa soleiðis fyri, at almenningurin skal kunna vitja umborð á Logos Hope trý vikuskifti í august mánaði.

Tað er felagsskapurin »Operation Mission« sum rekur hetta missiónsskipið. Felagsskapurin arbeiðir í fleiri enn 100 londum og hevur fleiri enn 4000 sjálvbodnar medararbeiðarar úr øllum heimsins londum.

## Nógv eftir at gera

Sunnukvøldið hendi so tað, sum mong hava bíðað leingi eftir. At Logos Hope kom til Danmarkar, har seinasta arbeiðið umborð skal gerast.

Nógv hevur verið fyrireikað í hesum sambandi. Eitt skifti var ætlanin at hava almennu móttøkuna í danska høvuðsstaðnum, men hetta varð seinni broytt til Køge, ið liggur beint sunnanfyri Keypmannahavn.

Hagar kom Logos Hope um hálvgum sjey-tíðina sunnukvøldið. Hóast veðrið ikki var av tí besta, so var nakað av fólki møtt upp fyri at bjóða skipi og manning vælkomnum.

Millum fólkini á bryggjuni vóru einir 20 føroyingar, sum heilsaðu gestunum við Merkinum á lofti, veit heimasíðan hjá Kristnastovu at siga.

Tá skipið hevði lagt at, vórðu føroyingarnir bodnir umborð til ein drekkamunn. Og her fingu teir høvið at síggja skipið og hvussu tað nú fullkomuliga er vorðið umskapað til sítt nýggja endamál.

Millum tey stóru arbeiðini umborð er tað at leggja eitt eyka dekk, har sum gamla bildekkið var. Nýggja dekkið skal hýsa stóru bókasøluni.

- Nógv arbeiði skal tó enn fáast frá hondini, áðrenn Logos Hope kann góðkennast sum ferðamannaskip og brúkast sum missiónsskip.

- Vónað verður, at nógvar sjálvbodnar hendur, bæði lærdar og leikar koma til Køge fyri at gera skipið liðugt, verður sagt av skipinum.

# Klárt at byggja í Vági

**Á býráðsfundi í farnu viku gav Vágs býráð byggiloyvi til bygging av Ellis- og røktarheimi í Vági og Økisdepli fyri sinnisveik í Suðri**

Ellis- og røktarheimið er ein bygningur í trimum hæddum har pláss er fyri 24 búfólkum. Tað eru Vágs, Porkeris, Hovs og Sumbiar kommuna, sum eru ánarar av hesum ellis- og røktarheiminum.

Frammanfyri sjálvan høvuðsbygningin verður Økisdepilin fyri sinnisveik bygdur. Talan er um lonir við 10 íbúðum. Av teimum 10 eru tærátta sosialpsykiatrisk búpláss, meðan tvey eru ætlað sum umlættingarpláss.

Í niðastu hædd í høvuðsbygninginum verða høli til virknistilboð fyri sinnisveik.

Bygt verður á einum øki norðan fyri Vatnið vesturi á Eiðinum. Arkitektaarbeiðið hava Albert Isfeld & Gudmund S. Hansen arkitektar staðið fyri.

**sb.**



*Bygningurin er vakur á at líta og hevur møguleika fyri at brúka felags hentleikar*

*Mynd: vagur.fo*